# PLANTUPAKKAR

## 1 Escallonia macrantha, Eskallonia



Hávaksin veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Trívst best í góðari, gloprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. Natúrlig útbreiðsla: Kili. Okkara tilfar: uppruni úr Orknoyggjum.

## 2 Pseudopanax colensoi, Pseudopanaks



Hávaksin veturgrønur runnur. Vanliga antin bert sum kall- ella kvennplanta. Blómurnar hava ein týðiligan hunangsanga, og plantusevjan er serliga kleimin. Trívst best í góðari jørð og lívd. Tolir nakað av skugga. Runnurin hóskar eisini væl at hava í eini stórari krukku, t.d. í eini garðsstovu. Úr Nýsælandi. Maori heitið er Whauwhaupaku.

## 3 Olearia macrodonta, Nýsælendsk Kristtorn



Stórur, breiðvaksin, veturgrønur runnur. Stór grágrøn grovtent bløð, men uttan tornir. Blómurnar líkar summardáa, í stórum tyssum. Eldri runnar blóma væl. Hóskar væl til girðing. Eingi ávís krøv til jørðildið. Harðførur, tolir væl sjóráma. Ber ein moskuskendan anga. Úr Nýsælandi.

## 4 Fagus Sylvatica 'Atropurpurea', Reyðbók



Stórvaksið leyvfellandi træ (verður bert miðalstórt í Føroyum). Dimmreyð bløð. Trívst ikki væl her, og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og góða, kálkríka mold. Mest nýtt sum staktræ. Avbrigdið er stórvaksin klonur. Úr Danmark.

## 5 Griselinia littorialis, Griselinia



Hávaksin veturgrønur runnur. Bløðini gulgrøn. Trívst best í moldríkari jørð. Trívst ikki í andgletti, men harafturímóti væl undir einum eystur- ella norðurvendum veggi. Tolir væl saltráma. Hóskar væl til størri stakrunn, ella sum tilskorin girðing. Kall- og kvennplantur hvør sær. Kann fáa skaða í nógvum vetrarkulda. Úr Nýsælandi.

## 6 Leptospermum humifusum, Rósumyrta



Miðalhøgur veturgrønur ella hálvavegna veturgrønur runnur. Smáar, hvítar blómur. Smávaksin, leðurkend bløð, brúngrøn á liti. Tørvar góða mókenda jørð og góða lívd, um hann skal trívast. Natúrlig útbreiðsla: úr Tasmania. Okkara tilfar: úr Tasmania.

## 7 Larix kaempferi, Japanslerkur



Stórvaksið leyvfellandi nálatræ. Nálirnar fagurgulan heystarlit. Best í djúpari, gloprutari jørð. Harðførur, men veksur seint og krókut. Kann eisini hóska væl sum klipt tøtt runnagirðing. Natúrlig útbreiðsla: Japan. Okkara tilfar: av donskum uppruna.

## 8 Sorbus vilmorinii, Vilmorinii rønn



Lítið leyvfellandi træ. Hvítar blómur í juni. Er sermerkt við reyðum liti um heystið, og reyðum ber. Fuglum dáma væl berini. Trívist best í einum hampiliga góðum urtagarði.

## 9 Nothofagus antarctica, Nire-suðurbók



Miðalstórt leyvfellandi træ. Toluliga harðført. Vakran greinbygnað og fagurtlitt leyv um heystið. Úr Eldlandinum. „Nire" er staðbundna heitið har.

## Plantið eitt træ, í góðum grannalag

Í faldaranum eru nakrar hentar leiðreglur, tá trø verða plantað og hildin viðlíka. Faldarin kann heinast í Snarskivuni ella takast niður av heimasíðuni torshavn.fo




TÓRSHAVNAR KOMMUNA